


*Kvinnurnar hjá Fleyr høvdu størri yvirskot enn Mjølnir. Tí vunnu tær dystin teirra millum í gjár og settu seg á oddasessin, samstundis sum tær við vissu vunnu sær pláss í FM-finaluni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Fleyr-kvinnurnar í finaluni

**KVINNUFLOGBÓLTUR** Við einum 3-1 sigri á Mjølni smoygdi Fleyr sær í gjár upp á oddasessin og tryggjaði sær pláss í FM-finaluni, ið allarhelst verður ímóti Mjølni, ið bara skal vinna ein dyst aftrat

**Hilmar Jan Hansen**

Í kvinnuflogbólti hevði Fleyr sína stórheitstíð frá 1989 til 1997, tá felagið vann seks av níggju møguligum meistaraheitum, men síðani er einki steyp endað í høvuðsstaðnum. Heldur ikki hevur Fleyr vunnið nakra steypafinalu, síðani farið var undir at spæla tær í 2000.

Men nú er møguleikin at berja seg innaftur í toppin, tí í gjár gjørdist greitt, at Fleyr við 100 prosent vissu verður annað av FM-finaluliðunum hjá kvinnunum. Fleyr vann 3-1 á Mjølni, sum enn ikki hevur vissu fyri sínum finaluplássi, men allíkavæl sær út til at vera á veg í finaluna eisini.

Fleyr hevur tey seinnu árini havt eitt gott lið, sum eitt nú hevur verið væl umboðað á landsliðnum, men kortini er ikki eydnast at vinna seg heilt fram ígjøgnum. Í vetur tykist kortini, sum ganga tingini meira upp í eina hægri eind, og Fleyr-kvinnurnar tykjast duga betur at takla støðurnar, tær koma í, tí undanfarin ár eru tær altíð uppsteðgaðar, beint áðrenn komið var á mál.

– Tað er ótrúliga deiligt, at vit endiliga klára at vísa, at vit eru nummar eitt, og vit ætla at fara eftir øllum, tá FM-finalurnar vera, sigur Rakul Dalsgaard-Jakobsen, liðskipari hjá Fleyr.

– At tingini nú rigga betur hjá okkum, hongur helst saman við, at vit hava fingið meira rutinu og eisini hava eina rúgvu av venjing aftan fyri okkum. Vit hava spælt saman nokk so leingi nú og eru ordiliga komnar at kenna hvørja aðra, so tí haldi eg, at vit eisini fáa tingini betur at rigga.

## Fleyr betri byrjan

Í dystinum í gjár eydnaðist Fleyr at koma betur frá byrjan og vinna fyrsta sett rímiliga sannførandi, og tað hjálpti væl til, at Fleyr at enda vann allan dystin: – Vit hugsaðu bara um hetta sum ein vanligan dyst, har vit sjálvandi vildu gera okkara besta. Og tað er jú altíð umráðandi at vinna fyrsta sett, so tað gav okkum eina góðan byrjan, sigur Rakul.

Tá gjørdist tað munandi tættari í øðrum setti, har Mjølnir var á odda tann fyrra partin, men varð tikið aftur við 18-18. Nú gjørdist spennandi, men Mjølnir hevði yvirskotið til at vinna settið 26-24. Í triðja setti var tað hinvegin Fleyr, ið gekk undan at byrja við og var framman fyri 14-10 eitt skifti. Men hóast Mjølnir kom afturíaftur og javnaði til 17-17, kláraði Fleyr eisini at hála hetta settið inn og leggja seg á odda 2-1 í dystinum.

Nú var fjórða sett síðsti møguleikin hjá Mjølni, skuldi dysturin ikki tapast. Spælið hjá báðum pørtum var nervøst og uttan stórvegis samanhang. Fleyr var frammanfyri 10-7, men so servaði Marjun Kalsø nakrar góðar servur, so Mjølnir fór framum 13-10. Fleyr vildi kortini ikki sleppa, men vann seg innaftur og endaði við at vinna setti 25-21 og harvið eisini dystin.

## Bestu liðini

Hóast tapið, so er venjarin hjá Mjølni, Boban Ilic, sannførdur um, at finaluplássið ikki er í vanda, nú Mjølnir hevur tveir dystir eftir.

– Nei, vit eru við vissu í finaluni, tí vit skulu bara vinna ein av tveimum dystum, vit hava eftir. Tann fyrri av teimum er ímóti KÍF, men vit eru so mikið betri, so vit koma í finaluna. Vit hava eitt sterkt lið, so vit klára tað, sigur Boban Ilic, ið vísti á eina orsøk til, at Fleyr kanska kom í so lætt til sigurin í gjár: – Fleiri spælarar hjá okkum hava verið sjúkir, og tað var ein orsøk til, at vit ikki spældu so trygt og væl, sum vit plaga. Hinvegin spældi Fleyr sera væl í dag, og teirra spælarar vóru uppsettir og stríddust væl.

Bæði hann og Rakul eru sannførd um, at tað verða tey bæði bestu liðini, ið koma í FM-finalurnar, sjálvt um Mjølnir teoretiskt ikki hevur tryggjað sær sessin, fyrr enn ein dystur er vunnin aftrat.

– Eg haldi, at Mjølnir passar væl til okkum. Tær hava gott álop, men vit hava eisini góðar móttøkur, so tað verða neyvan finalur við hesum lobbunum, sum vit skulu kasta okkum eftir. Kemur Mjølnir í finaluna, verður hon millum tey bæði bestu liðini í Føroyum í løtuni, men skuldi SÍ yvirhálað, so eru vit eisini klár til ta finaluna, sigur Rakul Dalsgaard-Jakobsen.

– Ja, eg haldi, at Fleyr er eitt betri lið enn SÍ, og hetta verður tí ein finala við góðum flogbólti, tí vit og Fleyr eru tey bestu liðini. Í finaluni ræður um at vísa mentala og kropsliga styrki, tí har eru tveir dystir dag um dag, sigur Boban Ilic.

Næsti dysturin hjá Mjølni verður longu mikukvøldið klokkan 20, tá KÍF kemur á vitjan í Badmintonhøllini í Klaksvík.

hilmarjan@sosialurin.fo